# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Torleif Sigurðsson



Deyðsboð, óansæð um tey koma eftir langa sjúkralegu ella sum í Torleif'sa føri, sum eitt skot frá klárum himli, er ongantíð nakað, ið vit eru fyrireikað uppá. Tann dagin, týsdagin tann 12. februar, á veg norð úr Havn, ið eg fekk deysboðini um Torleif, var tað sum steðgaði alt upp. Tann maður, ið eg síðstu næstan 16 árini, havi arbeitt tætt saman við í politikki, og sum ikki bert var partamaður, men eisini vinmaður, var bráddliga ikki ímillum okkum longur. Tað kendist, sum at nú var eitt tíðarskeið í lívinum liðugt.

Torleif og eg komu at kennast av álvara í valskeiðnum 1992-1996, tá ið eg gjørdist varalimur hjá Javnaðarflokkinum í Klaksvíkar býrað. Torleif var tá formaður í Fótbóltsambandinum, og sjálvt um hann ongantíð tímdi at ferðast, nóg illa til Havnar, so var hann ofta burtur í samband við fotbóltin. Um hann var burtur, í styttri ella longri tíð, so syrgdi hann altíð fyri, at varaumboðið tók sæti í býráðnum fyri hann. Hetta, altíð at lova einum framat, var ein eginleiki, ið var ein partur av Torleif sum menniskja. Tá ið vit ið sótu í býráðnum, skuldu velja limir í uttanhýsisnevndir, legði hann ta linju, at vit ikki sjálvi skuldu býta sessirnar ímillum okkum, men velja onnur í flokkinum. Øllum, ið vístu politiskan áhuga, vildi hann lova framat.

Tá ið eg í 1996 var vald inn í býráðið, vil eg siga, at eg varð lærd upp av Torleifi í nevndararbeiði. Hin partin, bakgrundsvitanina, hana fekk eg frá Christian Olsen, sála, ið hevði sitið nógv ár í býraðnum. Christian og Torleif vóru vinmenn, og tað var skjótt, at eg og míni vórðu drigin inn í henda vinarskaran, og tað eri eg teimum báðum ómetaliga takksom fyri.

Vit vóru, sum nevnt, mest saman í politiskum arbeiði, men hóast tað, so visti eg altíð tað síðsta nýggja um børn og ikki minst abbabørn, ið hann helt ótrúliga nógv av. Eisini spurdi hann meg argandi, um eg sum reyðsokkur helt tað vera í lagi, at hansara kona arbeiddi heima. Vit vóru ikki altíð samd politiskt, tað kom ofta av aldursmuninum haldi eg, hann argaði meg altíð við, hvussu dýr eg var fyri kommununa við hesi barnaansingini, sum hann tók til. Hóast tað, so var hann altíð loyalur og bakkaði meg upp í teimum málum eg kom við.

Torleif var javnaðarmaður útfrá sínum egnu lívsroyndum og ikki útfrá nøkrum teoretiskum, hann sýndi tað í verki og hevði onkuntíð ilt við at skilja tey, ið høvdu eina meira akademiska tilgongd til politikk. Tað síðsta vit tosaðu um, sunnukvøldið innan hann doyði, var hvussu vit skuldu skipa okkum í býraðnum, nú eg hevði tikið sæti á tingi. Hóast tú ikki altíð segði so nógv, so hevur Javnaðarflokkurin nógv at takka tær fyri, serliga tað, ið tú vísti í tínum máta at arbeiða politiskt uppá.

Við missinum av fyrst Christiani og síðan Torleifi, tykist tað, sum um eitt ættarlið av politikarum er farið, tað er ikki lætt at koma aftan á tykkum, men í virðing fyri tykkum vilja vit, ið eftir eru, gera tað, ið vit eru ment at bera arvin víðari.

Vit eru nógv, ið kenna stóran sakn, nú ið tú er farin, ikki minst tíni nærmastu. Vit í Jørundsgøtu vilja, við hesum fáu orðum, takka tær so hjartaliga fyri alt, ið vit hava havt saman.

Hvíl í friði góði Torleif, og harrin signi tykkum, ið eftir hann sita.

**Eyðgunn Samuelsen**

## Minningarorð um okkara elskaðu ommu

# Sannu í Soylu

**f. 25. apríl 1920, d. 26. desember 2007**



Tað er altíð ringt at missa ein, sum man elskar, og tað var tað eisini hjá okkum, tá omman andaðist 2. jóladag 2007.

Tá vit hugsa aftur á tær stundir, vit hava havt við ommuni er tað við einum smíli og einari heitari kenslu um hjarta. Tá man kom inn á gólvið sat hon altíð í stólinum við vindeyga í ferð við at binda eitt hvørt plaggi og tú slapp ikki útaftur fyrr enn tú hevði fingið ein drekkamunn og okkurt søtt afturvið. Tað bleiv lívliga práta um bæði leyst og fast og omman var ein persónur, som altíð raðfesti familjuna sera høgt. Tá tað gekk okkum gott, var hon eisini glað og hun ringdi dúgliga og spurdi hvussu tað gekk.

Omman elskaði øll langommubørn, ommubørn og børn síni sera høgt, men tað er ein persónur, sum hon altíð hevði í tonkunum. Tað er abbin. Hann var hennara sálarvinur og hóast tey vóru gift í heili 60 ár, følnaði teirra kærleiki ongantíð. Tá hann gjørdist sjúkur og var vekk heimanífrá í 1 ár, var hon við honum. Abbin elskaði eisini hana sera høgt og hann saknar hana sera nógv.

Man sleppur tó ikki undan at fella eitt tár tí at hon hevur altíð verið ein stórur partur av okkara lívið.

Um man hevði ein ringan dag, gjørdi hon alt fyri at fáa ein í góðum lag aftur, og tú kundi tosa við ommuna um alt og spyrja hana um alt.

Vit vilja takka tær, omman, tí at tú ert orsøkin til at vit báðar systrarnar, eru komnar at kenna hvørja aðra so væl, sum vit gera. Tað var tín vilji at vit skuldu vera væl og tað hevur tú klárað til fulnar.

Vit elska teg og fara ongantíð at gloyma teg.

Takk fyri alt!

**Fríðgerð og Anita í Soylu**

## Kiwanis við gávu í Skálavík

Sunnudagin 30. mars var stór móttøka í sambandi við at felagsskapurin Kiwanis úr Íslandi hevur verið í Skálavík og latið gávu til barnagarðin Leika.

Dagurin byrjaði við kirkjugongd og síðani varð døgurði niðri á Keldu.

Ferðalagið var stórt, eini 50 gestir harav 34 úr Íslandi. Eisini var Ísafjarðar kvinnufelag við í ferðalagnum. Mánadagin var farið inn á Skála, sum skal hava vinarbýarsamstarv við Ísafjørð.

*Kelda:www.bkv.fo*



*Leiðarnum av barnagarðinum Leika í Skálavík, Tóra Myllhamar í Geil, og varaborgarstjórin Palli á Lava Olsen*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Jonny Joensen**

fyrrverandi fyristøðukvinna á Hotel Tórshavn

andaðist í Keypmannahavn leygardagin 29. mars, 67 ára gomul.

Bønarhald verður á Håndværkerhaven 49, Bispebjerg, týsdagin 1. apríl kl. 11.00.

Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju mikudagin 2. apríl kl. 14.00.

**Andrias, Tóra og Herman**

Tey, ið vilja minnast Jonny, kunnu lata Hósvíkar kirkju eina gávu. Konta í peningastovnunum